gult cyan magenta svart

Fyrsta altjó›a kvinnukappingin í Føroyum

Kvinnufótbólturin fer í hesi vikuni at seta dám á í Gundadali

Føroyska U–18 kvinnulandsli›i› avmynda› i Gundadali

mynd: FSF

Hvørja fer› altjó›a kappingar eru á skránni í Føroyum, síggja tey í FSF ta› solei›is, at talan er um eina sta›festing av, at UEFA og FIFA rokna føroyskan fótbólt sum eitt limaland á hædd vi› øll onnur limalond.

Í dag ver›ur hetta ivaleyst tiki› sum ein sjálvsagdur lutur, men hetta hevur ikki altí› veri› so. Ta› eru bara tólv ár sí›ani, at eitt langt og drúgvt strí› enda›i vi›, at Føroyar vóru gó›tiknar sum limur í FIFA og seinni í UEFA. Og ta› eru bara níggju ár sí›ani, at føroyska a–landsli›i› ikki fekk loyvi at spæla heimadystirnar í EM undankappingini í Føroyum.

Sí›ani í 1992 hevur heimavøllurin hjá a-landsli›num veri› í Føroyum. Hetta sama ári› luttóku feløgini fyri fyrstu fer› í Europa Cup, og sí›ani tá hava nógvir landsdystir og a›rir altjó›a dystir veri› í Føroyum.

Í løtuni er einki a–landsli› í kvinnufótbólti. Li›i› luttók í EM undankappingini, sum var í 1995 og í 1996. Sí›ani hevur einki veri› gjørt vi› a–landsli›sarbei›i›, og í løtuni hevur Fótbóltssambandi› ongar ítøkiligar ætlanir um at fara uppí aftur EM undankappingar.

Sí›ani 1997 hava Føroyar tiki› lut í u–18 kappingum fyri kvinnur. Ta› hevur kenst eitt sindur tvørligt, at kappingarnar hava veri› so seint á árinum – tær hava veri› í november og tískil langt aftaná at landskappingarnar í Føroyum vóru loknar.

Tey seinnu árini hava unglingarnir á mannfólkasí›uni fleiri fer›ir kappast heima á landi. Bæ›i í NM kappingum og í EM undankappingum. Kappingin, sum í hesum døgum er í Gundadali, er tann fyrsta altjó›a kvinnukappingin av hesum slagi. At Føroyar hava fingi› liti› í hendur at skipa fyri kappingini, ver›ur tiki› sum eitt her›aklapp og ein álitisváttan frá UEFA, og vit skulu n‡ta høvi› at ynskja øllum eina gó›a kapping.

Skráin
Mánadagin 10. juli
kl. 14.30 Ukreina–Skotland
kl. 17.00 Sveis–Føroyar

Mikudagin 12. juli
kl. 15.00 Ukreina–Sveis
kl. 17.00 Skotland–Føroyar

Fríggjadagin 14. juli
kl. 17.00 Skotland–Sveis
kl. 17.00 Føroyar–Ukreina

Álvur kennir allar genturnar

Venjarin hjá føroyska u–18 landsli›num, sum í hesi vikuni er vertur í EM undankapping, hevur fingist meiri vi› kvinnufótbólt enn nakar annar føroyingur

Ta› man neyvan vera nakar ivi um, at tann, sum veit mest um føroyskan kvinnufótbólt, og sum harvi› kennir alt til fótbóltsligu dygdirnar hjá spælarunum, sum í hesi vikuni strí›ast í Gundadali, er Álvur Hansen. Hann hevur veri› landsli›svenjari sí›ani 1997, hann hevur samband vi› allar venjararnar í feløgunum, og hann veit, hvussu nógv ta› ver›ur gjørt vi› venjingina í øllum feløgunum.

Um Álvur skuldi havt nakran kappingarneyta í innliti í kvinnufótbólt, so hev›i ta› veri› Jón Harald Poulsen, sum er hjálparvenjari hjá u–18 kvinnulandsli›num. Jón Harald hevur í mong ár veri› venjari hjá KÍ kvinnunum, og longu í 1993 var hann venjari hjá a–landsli›num. Á heimavølli stó›u tær seg væl ímóti einum t‡skum úrvalsli›i, sum vann 1–0 bæ›i í Klaksvík og í Havnini.

Arbei›sumstø›urnar gera, at Jón Harald er ikki so nógv uppií nú, sum hann onkuntí› hevur veri›. Men hann hevur kortini ábyrgdina av KÍ kvinnunum, sum næstsí›sta sunnudag vunnu løgmanssteypi›.

Virkin venjari

Álvur Hansen hevur umframt í fótbóltinum eisini veri› aktivur í flogbóltinum. Í 1989, tá hann var 22 ára gamal, var› hann valdur til formann í Flogbóltssambandinum, og ta uppgávuna røkti hann í f‡ra ár.

Í 1987 gjørdist Álvur fyrstu fer› venjari hjá einum gentuli›i. Ta› var í barndómsfelagnum ÍF, har hann vandi tær 12–14 ára gomlu. Ta› vóru hesar genturnar, sum í 1991 vunnu fyrsta og higartil einasta FM í bestu kvinnudeildini til Fuglafir›ar.

Í 1992 vandi Álvur kvinnurnar á Skála, sum vunnu bæ›i landskappingina og steypakappingina. Í 1993 fór hann til Esbjerg at læra til fysioterapeut, og sí›ani 1995 hevur hann veri› kn‡ttur at kvinnufótbóltinum, umframt at hann hevur veri› fysioterapeutur bæ›i hjá GÍ og onkuntí› hjá landsli›num á mannfólkasí›uni.

Álvur var hjálparvenjari, tá Páll Gu›laugsson í 1995 og í 1996 hev›i ábyrgdina av kvinnulandsli›num, og sí›ani 1997 hevur hann havt ábyrgdina av u–18 kvinnunum, umframt at hann hevur veri› venjari á Skála, har hann b‡r, og í Gøtu, har hann í ár hevur ábyrgdina av besta li›num.

Jar›bundin

Tá vit spyrja Álvur, hvat hann væntar av EM undankappingini, so sta›festir hann, at føroysku kvinnurnar hava vant dúgliga uppundir kappingina. Men hann roknar vi›, at ta› ver›ur torført at røkka upp í toppin. Álvur heldur, at Sveis hevur eitt gott li›, me›an hann veit minni um skotska li›i›. Føroyar megna›u javnleik móti Ukreina í fjør. Álvur roknar vi›, at ta› ver›ur torført at røkka so gó›um úrsliti hesa fer›, men ta› skal standa sína roynd.

Álvur vil ikki taka naka› frá gentunum, sum hesa fer› umbo›a Føroyar. Men hann harmast um, at ta› eru fleiri, sum høvdu havt gó›an møguleika at styrkt um li›i›, men sum ikki leggja í at spæla á landsli›num. Onkur tekur hondbóltin so nógv framum, at hon ikki tímir at venja fótbólt, og onkrar a›rar hava heldur valt at fara í heitari lond at sóla sær, heldur enn at spæla landsdystir í EM undankappingini.

Ta› tykist ofta vera torført at fáa hagtøl um altjó›a kvinnufótbólt til vega. Álvur fylgir væl vi›, og hann grei›ir okkum frá, hvussu hann fær hagtølini:

– Tá vit fyrstu fer› tóku lut í U–18 EM undankappingini í 1997, møtti eg einum eingilskum tí›indamanni, sum hevur ta› sum sína sergrein at skriva um altjó›a kvinnufótbólt. Hann hevur sí›ani sent mær øll úrslit, og afturfyri havi eg sent honum úrslitini og hini hagtølini yvir teir dystirnar, sum vit hava spælt.

Yvirhála›

Tá vit spyrja Álvur, hvussu føroyski kvinnufótbólturin stendur seg nú sammett vi› í 1997, tá u–18 landsli›i› fyrstu fer› tók lut í EM undankappingini, so svarar Álvur solei›is:

– Luttøkutali› er vaksi› ótrúliga nógv. Bæ›i tí áhugin fyri kvinnufótbólti er øktur kring Europa, og tí at so nógv n‡ggj lond hava sæ› dagsins ljós. Nú luttaka 32 lond í kappingini. Vit vóru tí›liga uppií, og í 1997 vór›u vit flokka› í næstovasta styrkisbólkinum. Ta› eru vit ikki longur, sta›festir Álvur Hansen, sum harvi› ásannar, at menningin í nógvum av londunum, sum nú eru uppi í kappingini, hevur veri› størri, enn hon hevur veri› í Føroyum.

jh

Leiftur tapti aftur

John Petersen skora›i í Intertoto-dystinum ímóti Sedan, men ta› hjálpti einki

Íslendska felagi›, Leiftur, har f‡ra føroyingar spæla, tapti eisini seinna Intertoto Cup dystin ímóti franska felagnum Sedan.

Dysturin, sum var› spældur á Ólafsfir›i í gjár, enda›i vi› 3-2 sigri til fraklendingarnar. Fyrri dysturin enda›i vi› 3-0 til Sedan, og samanlagdi sigurin var tí 6-2.

Í dystinum í gjár kom Sedan á odda 3-0, á›renn íslendska li›i› kom fyri seg. Í seinna hálvleiki minka›i føroyski landsli›sspælarin, John Petersen, um munin til 3-1, á›renn ein li›felagi› gjørdi ta› til endaliga úrsliti› 3-2.

Í gjárkvøldi› skuldi fleiri landskappingardystir ver›a í Íslandi. Uni Arge og hinir í IA skuldu spæla ímóti oddali›num Fylkir, og Allan Mørkøre og ÍBV fóru at royna seg á útivølli ímóti Grindavík. Allan Mørkøre fer nú at fáa n‡ggjan li›felaga, tí ÍBV hevur leiga› álopsspælaran Tómas Inga Tómasson frá danska superligafelagnum AGF.

Leiftur, sum í løtuni er aftast í bestu íslendsku deildini, skal ikki spæla aftur í landskappingini fyrr enn um 10 dagar.

John Petersen skora›i og minka›i um munin til 3–1 í Intertoto kappingini móti franska felagnum Sedan

savnsmynd

HB keypir Allan Mørkøre aftur

Beint á›renn bla›i› fór til prentingar í dag fingu vit at vita, at HB hevur keypt Allan Mørkøre aftur frá íslendska felagnum ÍBV.

HB og ÍBV eru eftir samrá›ingar komin ásamt um ein prís fyri Allan Mørkøre, og ver›ur hann sostatt vi› aftur á HB-li›num eftir summarste›gin. Partarnir eru eisini komnir ásamt um ikki at almannakunngera innihaldi› av avtaluni. Ta› er tó greitt, at HB og Allan Mørkøre hava gjørt eina langtí›aravtalu.

Havnar Bóltfelag fegnast um avtaluna, og ta› er ein stórur styrkur fyri li›i›, sum nú hevur enn betri møguleikar fyri at gerast føroyameistari. Allan Mørkøre var ein av berandi kreftunum, tá i› HB vann FM í 1998.


Allan Mørkøre ver›ur aftur at síggja á HB-li›num eftir summarste›gin

savnsmynd

Fingi› n‡tt tilbo› frá Bournemouth

Claus Bech Jørgensen hevur nú fingi› tilbo› frá Bournemouth um at leingja sáttmálan vi› tveimum árum

Claus Bech Jørgensen, sum hevur føroyska mammu, skriva›i í fjør undir ein 1 ára sáttmála vi› Bournemouth. Hesin sáttmáli kom í lag, eftir at hann hev›i royndarvant í enska felagnum, og sáttmálin kundi leingjast vi› einum ár, um partarnir samdust um ta›.

Men enska felagi› er so væl nøgt vi› Claus Bech Jørgensen, at felagi› nú vil hava hann at binda seg í einum n‡ggjum tvey ára sáttmála.

Claus Bech Jørgensen hevur spælt sum vongur á li›num hjá Bournemouth, og hann stó› seg so væl í fyrsta ári sínum í enskum fótbólti, at hann var› valdur til ársins spælara í felagnum.

Venjarin væl nøgdur

- Ta› er gott at vita, at fólk eru nøgd vi› spæli› hjá mær, men ta› sn‡r seg fyrst og fremst um li›i›, og eg eri sera fegin um, at eg kann halda fram í Bournemouth, sigur Claus Bech Jørgensen. Hann sigur, at spælararnir gle›a seg nógv til at sleppa í gongd vi› n‡ggja kappingarári› í august mána›.

Venjarin hjá Bournemouth, Mel Machin, er fegin um sín hálva føroying.

- Claus hevur ment seg nógv, sí›ani hann kom í felagi›, og eg fegnist um, at hann heldur fram her. Hann gevur seg altí› fult út fyri li›i›, og ta› eru slíkir spælarar, sum kunnu alt li›i› í gongd, sigur Mel Machin.

Malta frammanfyri Føroyar

Nú hevur Malta tiki› seg fram um Føroyar á n‡ggja styrkislistanum hjá altjó›a fótbóltssam bandinum FIFA.

Hetta er fyri fyrstu fer› í fleiri ár, at Malta er at finna omanfyri Før oyar á listanum.

Føroyska A-lands li›i› er fari› seks pláss aftur á listanum í ár, og tá Malta samstundis bert er fari› eitt pláss af ur, eru teir nú eitt pláss frammanfyri Føroyar.

Føroyar ver›a nú mettar sum nummar 118 av teimum 202 skrá settu fótbóltstjó›unum, og hinar smátjó›irnar í Europa, Luxembourg, Liechtenstein, Andorra og San Marino, eru framvegis aftanfyri Før oyar á listanum.

Ovast á listanum er Brasil, sí›ani Frakland, Kekkia, Spania, Argentina, Italia, Portugal, Holland, T‡skland og Noreg, sum er nummar 10. Danmark er nummar 16, Svøríki nummar 18, Finnland nummar 51 og Ísland nummar 56.

Styrkislistin hjá FIFA ver›ur kunngjørdur eina fer› um mána›in.

gult cyan magenta svart